

*Rubbek Rubeksen var fremsta ímyndin av mjólkarforsýningini*

mjólkarframleiðslan varð jøvn yvir alt árið. Og so miseydnaðist eisini ostagerð av avlopsmjólkini og tey skuldu enntá upplivað, at nøgdin at mjólk kom at minka, so onkran dagin fingu teir bert 20 litur av mjólk. Bøndurnir hildu eisini, at teir fingu ov lítið fyri mjólkina. Men fyri at stuðla bóndunum varð fóður selt uttan vinning.

Fyri at geva eina hylling av mjólkanøgdunum kann nevnast, at í 1909 fekk mjólkaforsýningin 141.000 litrar av mjólk. Í seinnu krígsárunum 1914-18 fór nøgdin niður um 100.000, men í 1932 var nøgdin komin uppá 370.000 litrar.

Tað varð eisini nevnt í 25 ára ritinum, at neytatalið ikki var økt, hóast bøttu møguleikarnar hjá bóndunum at sleppa av við mjólk. Men frágreiðingin er tann, at nú vórðu kýrnar fóðraðar og góvu tískil meira. Bøndurnir høvdu tískil funnið út av, at tað loysti seg betri at hava færri neyt, sum mjólkaðu nógv enn nógv neyt, sum mjólkaðu lítið.

Mjólkaprísirnir, tá mjólkarforsýningin byrjaði var 16 oyru pottin, men fyri hálvskúmaða mjólk var hann 10 oyru. Fyri róma var hann 60 oyru.

## Hvar er poststemplið?

FF-blaðið hevði í síni tíð eina eftirlýsing av poststemplinum hjá Ruth. Vit vita, at Smiril eisini hevur havt eitt stempul. Skipini hava havt ein postkassa, har fólk hava lagt brøvini, sum skuldu hagar skipini sigldu. Uppgávan hjá skiparanum hevur verið at stempla tey, og til hetta endamál hevur hann fingið stempul frá postverkinum. Tað finnast bert fá brøv ella frímerki við hesum stempli, og sumt bendir á, at stemplið er bert brúkt í 1908 og kanska 1909. Um onkur liggur inni við Ruth-stemplum, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Álv Danielsen, tlf. 32 12 91. Frímerki við slíkum stempli eru uttan iva rættiliga nógv verd í dag. Dømi er um at "brævstykki" við stempul frá Ruth er selt fyri kr. 10.000.

## Fyrstu árini gav meiaríið tískil hall, meðan Ruth gav avlop

So við og við kom fyritøkan rættiliga fyri seg, men fyrri heimsbardagi og serliga tíðin aftaná skapti ólag á alt. Millum annað øktust útreiðslurnar til kol, sum jú var brennievnið hjá Ruth, frá kr. 3.000 árliga til góðar kr. 31.000.

Eftir kríggið varð eisini farið undir margarinframleiðslu, sum gjørdist ein stórur partur av virkseminum hjá fyritøkuni. Í dag kunnu vit bert undrast á, at tað skuldi bera til fyri 80-90 árum síðan at framleiða margarin í Føroyum, meðan tað ikki ber til í dag. So væl gekk, at í 1920 kundi felagið geva vinningsbýti upp á 20%.

Nú gjørdist Ruth eisini ov lítil til tann nógv økta trafikkin. Og fólk knarraðu um, at tað var so trongligt umborð. Á ársaðalfundinum í 1923 fekk nevndin heimild til at útvega nýtt skip fyri Ruth, eins og hon fekk heimild til at selja Ruth. Hetta førdi fyrst til, at Tróndur, sum eldri fólk enn minnast, varð keyptur 13. apríl 1926.

Teir gomlu dugdu eisini vinnubúskap. Við at minka prísin á ferðaseðlum við eini helvt trífaldaðist ferðafólkatalið, og var hetta eisini ein kollvelting. Nú kundu fólk fara at ferðast til stuttleika og ikki bert fara, tá tað var av plikt.

## Tróndur - ikki minni farið

Ruth sigldi sum frásagt norður í Sundalagið til Hvalvíkar og Oyrar og á Skálafirði inn til Skála og Søldafjarðar, so tað er vituligt, at tað broytti og lætti øgiligt um postflutningin, sum inntil tá hevði verið trupul og seinur. Tað sigur seg sjálvt, at tá ið Ruth hevði siglt frá 1908 og upp í tjúguni, var hann ov lítil bæði til ferðafólk, post og góðs. Stundum var onkur bátur leigaður at sigla umframt, men undir fyrra heimsbardga, tá nógv varð vunnið við útróðri, var ofta ringt at fáa nakran bát til leigu.

Felagið keypti tessvegna í 1926 í Oslo ein stóran og skjóttgangandi motorbát fyri 21.000 nkr. Hann var ikki meira enn seks ára gamal og fekk navnið Tróndur. Hann var ein luksusbátur, ið ikki var eiti á. Hann hevði salón niðri undir og eina lítla roykisalón. Beinkirnir vóru polstraðir eins og ryggjastuðulin, ið kundi skiftast soleiðis, at tú vendi tann vegin, tær hóvaði best. Har var, í hvussu er eina tíð, útsøla av drekkamunni og góðgæti. Og á yvirbygninginum var "promenadudekk" og beinkir fram við lúnningina – so tað var skilligt eitt stórt framstig. Og so hvørt sum vegir eisini komu til tær bygdir, har hann legði at, er tað skilligt, at hetta var risabroyting í samferðsluni í Føroyum. Meir krevur meir, vita vit. Nú kendist tað sum tíðarspell, at bygdafólk ikki kundu koma heim aftur sama dag. Um summarið 1935 var ferðaætlanin broytt soleiðis, at mjólkarbátarnir tríggjar ferðir um vikuna gjørdu tveir túrir um dagin.

Gamli Jóannes í Funningsstovu var í Noregi eftir Tróndi og førdi hann eina tíð. So var tað vist Rubekk hjá Mourtisi og síðan Hans í Funningsstovu, sonur Jóannes, sum gjørdust skiparar. Hans førdi bátin í mong, mong ár.

Tróndur hevði tveir motorar, so tað var ikki undarligt, at hann risti nakað illa, serliga í samburði við Ruth, sum við síni dampmaskinu streyk stillisliga gjøgnum sjógvin.

## Enn fleiri rutur

Eisini varð farið at sigla í Sandoynna t.v.s. Skálavík og Húsavík í 1923. Frá 1924 varð siglt vestur til Miðvágs, og í 1926 varð eisini farið at sigla til Vestmanna. Felagið útvegaði sær í mars 1923 motorbátin Sigmund til hetta endamál. Í desember 1926 varð Dúgvan keypt. Hon varð nýtt til at sigla postrutuna Nólsoy-Skopun-Hestur. Samstundis sigldi hon rutuna Tórshavn- Haldarsvík-Norðskála-Eiði.

Streymur, sum kom í 1932, sigldi rutuna Tórshavn-Vestmanna-Vágar týsdag. Fríggjadag varð rutan Tórshavn-Klaksvík-Viðareiði-Svínoy sigld. Hann kom eisini út í Fugloy.

Tá hevði meiaríið fingið eina deild í Klaksvík. Fyritøkan fekk eisini deild á Tvøroyri í 1933, og tá kom tann fyrri Sigmundur at sigla millum bygdirnar í Suðuroy, annan hvønn dag norður eftir og annan hvønn dag suður eftir.

Í 1939 fekk Løgtingið allan rætt til strandfarasigling, men fyri fyrst fekk mjólkarvirkið loyvi til at røkja allar sínar rutur. Aftaná kríggið tók landsstýrið fleiri og fleiri rutur undir seg, men ruturnar Sundalagið-Skálafjørðin hevði meiaríið framvegis. Í 1949 var ein strandfarabátur í Suðuronglandi Green Dolphin keyptur. Men gleðin um hann var stokkut - eina ódnarnátt í februar mánaði 1950 rak hann á land í Lítluvík í Havn og gjørdist vrak. Sama árið keypti felagið ein annan bát úr Onglandi. Hann fekk navnið Sigmundur og loyvi til at flyta 250 ferðafólk. Sigmundur sigldi fram til 1967, tá Tróndur varð keyptur. Seinni gjørdist tað Dúgvan, síðan Ternan 1, men fyri nøkrum árum gjørdist henda sigling søga.

Men tað eru longu nógv ár síðani, at mjólkin bert varð førd við tangabilum.

## Rubbek ímyndin

Mjólkarvirkið bygdi hús við Tórsgøtu og flutti úr Bringsnagøtu niðan hagar í 1922. Í 1928 bygdu teir pakkhús niðri í Vágsbotni. Og her rumsteraði Rubbek. Hann hevur verið uppi í stóran av tíðina. Fyrst við bátunum og síðan í pakkhúsinum. Hesin maður, ið skapti hugna og skemt alla staðni, hann kom. Maðurin ið dugdi at gera gráar løtur litfagrar, ikki minst eftir loknan arbeiðsdag. Tungt man hava verið at bera dunkarnar niðan úr Vágsbotni eftir vegi, sum lá millum bátadráttin og pakkhúsið Carlsborg

Tað var sagt, at Rubbek kundi vera nokk so grovur í munninum við ferðafólkini. Eina søga er um eina kvinnu, sum spurdi eftur WC umborð á Ruth. Á rættuligum sjómannamáli vísti hann henni at seta seg á lúnningina!

Mjólkaforsýningin kom at hava nógv annað virkemi, sum frá leið. Tað mest kenda var margarinufabrikkin. Teir gjørdu eisini sápu og bygdu ein virkisbygning uppi á Hálsi. Men tíðirnar broytast, og nú er stórt sæð einki virksemi eftir. Tað, sum hevur navnið á mjólkaforsýningini, verður framleitt í Danmark.

Tað mest ítøkiliga minnið um hesa tíð er "margarinfabrikkin" í Tórsgøtu, sum í dag er ungdómshús.

So heilt í gloymskuna fer henda



*Mong minnast eisini Streym*



*Sigmundur sigldi fram til 1967, tá ið hann varð avloystur av seinasta Trónd, sum seinni sigldi um Skopunarfjørð*